FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Almanna- og Mentamálaráðið
Eirargarður 2
FO- 100 Tórshavn

Staður: Tórshavn
Dagfesting: 09.06.2023
J. nr. (MEGD): 701-4-2023
Ummælistíð: 10.05.2023 til 09.06.2023
J. nr (AMMR): 23/01350

Hoyringarskriv viðvíkjandi

Uppskoti til løgtingslóg um Brekumboð

MEGD vil fyrst takka fyri høvið at senda hoyringarskriv viðvíkjandi nevnda uppskoti til løgtingslóg.

Inngangur

Føroya Løgting samtykti hin 13. mai í 2009 altjóða sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek (*Brekrættindasáttmálan*).[1] Tann 23. august sama ár, 30. dagin eftir, at danska stjórnin hevði boðað Sameindu Tjóðum (ST) frá hesi avgerð, fekk sáttmálin formliga gildi fyri Føroyar.

Føroyskir myndugleikar hava síðani tá havt lógarbundna skyldu at virka fyri, verja og fremja rættindi teirra, ið bera brek. Rættindi eiga sostatt at verða framd bæði *formliga* og *í verki*. Hetta kann verða bæði í mun til formligar orðingar og ásetingar í galdandi lógum, og at virka verður fyri rættindum soleiðis at fólk í sínum gerandislívi, við støði í lógarverkinum, veruliga fáa ágóða av eitt nú tænastum og veitingum. Til tess at tryggja samljóð ímillum tað *formliga* og tað *verkliga*, er altjóða brekrættindasáttmálin hin einasti altjóða mannarættindasáttmálin, ið áleggur limalondunum at tilnevna eina eftirlitsskipan ella eind.

Sambært viðmerkingunum hjá ST til altjóða Brekrættindasáttmálan, kann sjálvstøðuga eftirlitið, sambært grein 33, stykki 2, ikki fremjast til fulnar uttan eitt áhaldandi og væl skipað samstarv millum viðkomandi myndugleikar og

[1] Uppskot til samtyktar um at seta í gildi fyri Føroyar Sáttmála Sameindu Tjóða frá 13. desember 2006 um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. LM-162/2008.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

tey feløg, ið umboða viðurskifti og áhugamál hjá fólki, ið bera brek.[2] Limir í feløgunum hjá MEGD hava sambært altjóða brekrættindasáttmálanum rætt til at samskifti og samstarv verður tillagað á hóskandi hátt, soleiðis at umboðanin er røtt og rímulig, eitt nú tá loysnir skulu finnast í mun til lógarsmíð, fyriskipanir, tænastur, kunnandi arbeiði o.a.. Eisini eigur eftirlitið, sambært grein 33, stykki 1, at verða stuðlað av einum samskipandi eind ella arbeiðsbólkur, ið er samansettur av umboðum úr øll viðkomandi geirum (*sektorum*), og helst eisini umboðum úr viðkomandi áhugafeløgum hjá fólki, ið bera brek.[3]

MEGD hevur 24 limafeløg, sum innan ymisk øki umboða áhugamál og viðurskifti, hjá fólki, ið bera brek í Føroyum. Við støði í dagliga samskiftinum við limfeløgini kann MEGD staðfesta við vissu, at tað er grundleggjandi tørvur á óheftum og uttanveltaðum eftirliti innan brek- og vælferðarøkið í Føroyum.

Nevndin hjá ST fyri altjóða brekrættindasáttmálan viðmældi á fyrsta sinni til í viðmerkingum sínum til frágreiðingina frá Føroyum í 2014, at eitt óheft eftirlit verður stovnað í Føroyum sambært grein 33, stykki 2.[4] MEGD hevur áhaldandi varpað ljós á altjóða skyldurnar hjá føroyskum myndugleikum sambært grein 33 í altjóða brekrættindasáttmálanum, eitt nú umvegis hoyringarskriv, í almennum tíðindagreinum og á fundum við politisku skipanina. MEGD vónar, at eftirlitseindin fær nøktandi bygnað og grundarlag at virka sambært París meginreglunum,[5] og at fylgjandi viðmerkingar verða tiknar í álvara, nú lógaruppskotið verður smíðjað.

[2] Committee on the Rights of Persons with Disabilities General comment No. 7 (2018) on the participation of persons with disabilities, including children with disabilities, through their representative organizations, in the implementation and monitoring of the Convention. CRPD/G/GC/7. Stykki 1-9.
[3] Sama kelda sum í fótnotu 2. Stykki 35.
[4] Niðurstøður frá hoyringini í Brekrættindasáttmálanum frá 2014. Sí skjal á www.megd.fo/st-sattmalin
[5] Principles relating to the Status of National Institutions (*The Paris Principles*). Adopted by General Assembly resolution 48/134 of 20 December 1993.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Eftirlitið eigur at byggja á altjóða meginreglur

1. Í altjóða høpi verður væntað av framkomnum londum, at hesi seta á stovn mannarættindastovnar (*National Human Rights Institution* (NHRI)) sambært París-meginreglunum hjá ST.[6] Hetta skal gerast sum liður í at tryggja góða fyrisiting, rættarskipan og fremjan av mannarættindum. Løgtingslógaruppskotið vísur á, at óhefta eftirlitseindin sambært altjóða brekrættindasáttmálanum grein 33, stykki 2, eigur at byggja á París-meginreglurnar, serliga til tess at tryggja breitt heimildargrundarlag, óheftni, umboðan, og at virksemið verður uttanveltað.

2. Sambært ST, skal grein 33, stykki 2, lesast og skiljast sum ein stuðlandi fyriskipan til grein 4, stykki 3, í brekrættindasáttmálanum.[7] Grein 4, stykki 3, ásetur at:

   > *tá ið lóggáva og mannagongdir verða evnaðar til, sum seta í verk henda sáttmála og í øðrum avgerðartilgongdum um viðurskifti, sum víkja at fólki, ið bera brek, skulu limalondini leita sær ráð hjá fólki, ið bera brek, og taka tey við í arbeiðið. Eisini børn, ið bera brek, verða umboðað gjøgnum teirra umboðandi felagsskapir*.

3. Grein 1, stykki 3, í uppskotinum til løgtingslóg um Brekumboð, staðfestir, at *Brekumboðið er óheft í virki sínum*. Við støði í París-meginreglunum[8] vil MEGD mæla til, at orðið *uttanveltað* verður tikið við. Setningurin átti tí at sæð soleiðis út:

   Brekumboðið er óheft og uttanveltað í virki sínum

4. Serligu viðmerkingarnar til grein 1, stykki 3, nágreinað millum annað, at hesin setningur merkir, at Brekumboðið verður sett av landsstýrismanninum, men at eingin myndugleiki annars hevur ávirkan á virksemið hjá Brekumboðnum. Við støði í París-meginreglunum[9] vil MEGD vísa á at tað er av grundleggjandi týdningi, at Brekumboðið fer at virka óheft[10] og uttanveltað.[11] Hetta skal skiljast *breitt*, eitt nú í mun til stovnsgrundarlag, starvsfólkaviðurskifti, nevndarsamanseting, virkisføri og umboðan.

[6] Sama kelda sum í fótnotu 5.
[7] Sama kelda sum í fótnotu 2. Stykki 34.
[8] Sama kelda sum í fótnotu 5.
[9] Sama kelda sum í fótnotu 5.
[10] Óheftni: at vera óheftur at seráhugamálum. (sí www.sprotin.fo)
[11] Uttanveltaður: ein sum ikki er t.d. í felag el. partur í søk, ið ikki heldur við øðrum partinum, sum ikki eigur lut í einum máli (sí www.sprotin.fo)

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Óheftni hjá Brekumboðnum merkir millum annað at seráhugamál hjá myndugleikum, partapolitiskt áhugamál, egináhugamál og onnnur áhugamál, mugu treytaleyst verða sett til síðis, soleiðis at áhugamálini hjá fólki, ið bera brek, verða rætt og rímuliga umboðað. Fyri at vera *uttanveltað* skal Brekumboðið vera sjálvstøðugt, og undir ongum umstøðum vera ov tætt knýtt at einum myndugleika ella politiskum áhugamálum.

5. Bæði mannarættindaráðið (*Human Rights Council*) og aðalfundurin hjá ST (*General Assembly*) mæla til, at eftirlitseindir hjá londum søkja um viðurkenning (*accreditation*) frá altjóða metingarnevndini, ið kallast Global Alliance of National Human Rights Institutions (GANHRI).[12] Til tess at tryggja, at eftirlitseindin í Føroyum lýkir altjóða krøv, mælir MEGD til, at miðjað verður ímóti at søkja um viðurskenning frá GANHRI.

Eingin umboðan uttan at hoyra áhugafeløg hjá fólki, ið bera brek

6. Grein 2 í løgtingslógaruppskotinum ásetur í høvuðsheitunum at Brekumboðið skal kunna frítt úttala seg um viðurskifti innan tess virkisøki.
MEGD vil eisini í hesum høpi gera vart við, at grein 33, stykki 3, í altjóða brekrættindasáttmálanum, ásetur at tað er ein grundleggjandi treyt, at áhugafeløg hjá fólki, ið bera brek, verða tikin upp á ráð, tá tað er neyðugt og viðkomandi.[13] Um Brekumboðið á óheftum og uttanveltaðum grundarlagi skal kunna úttala seg um viðurskifti og áhugamál hjá fólki, ið bera brek, er tað ein fortreyt, at ein góður, atkomuligur og greiður hoyringarleistur verður skipaður. Uttan væl skipaða, neyva og munagóða umboðan, fer Brekumboðið at hava eitt munandi veikari grundarlag at finna loysnir. Fólk, ið bera brek, hava bæði lívsroyndir og praktiskan kunnleika at seta orð á egnar avbjóðingar, umframt viðkomandi loysnir, og við góðum samstarvi og/ella hoyringum, ber til at minka munandi um vandan fyri skeivari ella óneyvari umboðan. Hetta er høvuðsorsøkin til mottoið hjá altjóða brekrørsluni, sum er *Einki um okkum, uttan okkum* (*Nothing about us, without us*).

7. Brekumboðið eigur saman við áhugafeløgum og øðrum viðkomandi pørtum áhaldandi at virka fyri at menna sokallaðu mannarættindatilgongdina (*Human Rights Approach*).[14]

[12] www.ganhri.org/un-resolutions-on-nhris
[13] Sama kelda sum í fótnotu 2. Stykki 1-9.
[14] The Convention on the Rights of Persons with Disabilities Training Guide Professional Training Series No. 19 New York. HR/P/PT/19.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Umboðan og grundarlagið hjá Brekumboðnum

8. MEGD vil mæla til, at Brekumboðið verður skipað á so breiðum, fólkaræðiligum og fjølhugdum (*pluralistiskum*) grundarlagi, sum gjørligt, og at tað sostatt verður Føroya Løgting, ið fær ábyrgdina at seta Brekumboðið.
   Til samanberingar er tað Føroya Løgting, ið velur Løgtingsins Umboðsmann (LUM), ið hevur tað týðandi uppgávu at hava eftirlit við at fyrisitingarlógin verður fylgd. Tað hevur grundleggjandi týdning at LUM er uttanveltaður og óheftur, og Brekumboðið eigur at síggjast í einum líknandi høpi, tó við teirri grundleggjandi øðrvísi fortreyt, at Brekumboðið aftur meira virkisfýst skal hava møguleika at úttala seg frítt og verða við til at betra um rættindi og viðurskifti, ið viðvíkja fólki, ið bera brek. Sum stovnur, tykist LUM at virkað væl, bæði í mun til at vera óheftur og uttanveltaður, og tí eigur partur 1 í lógini um Løgtingsins umboðsmann[15] nýtast sum íblástur, tá Brekumboðið skal setast.
   MEGD byggir eisini hetta tilmæli á París-meginreglurnar,[16] og harvið ta fatan, at um eitt aðalráð skal velja Brekumboðið, verður grundarlagið hjá Brekumboðnum at virka ikki pluralistiskt og breitt á nøktandi hátt. Brekumboðið eigur at vera óheft og uttanveltað, og tískil er umráðandi at Brekumboðið ikki festir røtur í *geirahugsan* ella knýtir seg til ein ávísan geira, fram um aðrar. Í mongum øðrum londum er tað lóggevandi valdið, ið hevur ábyrgd fyri at seta eftirlitið sambært grein 33, stykki 2.

9. Sambært grein 8 í løgtingslógaruppskotinum vera fimm limir í nevndini fyri Brekumboðið, og sambært serligu viðmerkingunum til uppskotið er tað landsstýrismaðurin, ið setur nevndina, eftir at tilmæli eru send inn frá viðkomandi pørtum. Áhugafeløg hjá fólki, ið bera brek, eiga harav ein nevndarlim, landsstýrið eigur tveir, arbeiðsgevarar ein og arbeiðstakarar ein. Vísandi til París-meginreglurnar[17] eigur nevndin at byggja á pluralistiskt grundarlag, og MEGD mælir til fylgjandi tillagingar:

   - at áhugafeløg hjá fólki, ið bera brek, vera betri umboðað í nevndini.
   - at talið av nevndarlimum tískil verður økt upp í sjey ella níggju.
   - at nevndin fær eitt leysari tilknýti til virksemið hjá Brekumboðnum.
   - ella, sum nevnt í punkti 8, at tað verður Føroya Løgting, ið setur Brekumboðið. Um hetta verður leisturin, verður helst neyðugt at á meira grundleggjandi hátt tillagað bygnaðin handan nevndina.

[15] Løgtingslóg um Løgtingsins umboðsmann, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020. LM-027/1999.
[16] Sama kelda sum í fótnotu 5.
[17] Sama kelda sum í fótnotu 5. Síða 5.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

10. París-meginreglurnar vísa í partinum um *Samanseting og ábyrgd fyri sjálvræði og pluralismu* (EN: *Composition and guarantees of independence and pluralism*), at hátturin at tilnevna limir skal byggja á pluralismu.[18]
    Í hesum høpi vil MEGD vísa á, at um umboð fyri landsstýrið verða í nevndini fyri eftirlitseindina, skulu hesi einans hava ein ráðgevandi leiklut. Grein 6 í løgtingslógaruppskotinum ásetur, at landsstýrisfólkið kann loysa Brekumboðið úr starvi, undir ávísum treytum, millum annað um tríggir út av fimm nevndarlimum mæla til tað. Landsstýrið hevur sostatt formliga grundarlagið at hava beinleiðis ávirkan á Brekumboðið. MEGD metir, at hesin bygnaður kann ávirka í hvønn mun Brekumboðið fer at at virka sjálvstøðugt, óheft og uttanveltað, og at hetta tískil stríður ímóti París-meginreglunum.

11. MEGD vil mæla til, at Føroya Løgting skipar fyri aðalorðaskifti um mannarættindi. Í øðrum londum síggja vit, at altjóða mannarættindi fylla alsamt meira í almenna rúminum, og Brekumboð fer eftir ætlan at vera ein týðandi partur av samfelagnum. Tí hevði tað verið ein greiður fyrimunur, um mannarættindaviðurskifti verða umrødd á yvirskipaðum stigi nú ætlanin er at seta á stovn eina óhefta og uttanveltaða eftirlitseind innan brekøkið. Eitt frítt, uppbyggjandi og kritiskt orðaskifti átti eisini at betrað um virkisgrundarlagið hjá Brekumboðnum og øðrum pørtum, ið virka fyri mannarættindum í Føroyum. Eitt aðalorðaskifti um mannarættindi í Føroyum kann eisini verða við til at styrkja vælferðarsamfelagið, sum í komandi árini verður undir alsamt øktum trýsti.

12. Brekrættindasáttmálin skilur ímillum skyldina at fremja (*íverkseta, implementera*) sáttmálan, og so skyldunar at verja, virka fyri og hava eftirlit. Stjórnarmyndugleikar - serliga løgtingið og landsstýrið – hava skyldu at fremja sáttmálan, meðan eftirlitseindin og áhugafeløg sambært grein 33, stykki 2 og 3, hava skyldu at verja, virka fyri og hava eftirlit við rættindum.[19] Eitt aðalorðaskifti hevði millum annað givið møguleika at umrøða hesi viðurskifti.

13. Hetta løgtingslógaruppskotið kann broytast av løgtinginum á *vanligan* hátt. Í øðrum londum eru eftirlitseindir mangan forankraðar í hægri lóg, eitt nú í grundlóg ella stýrisskipan. MEGD hevði ynskt at bæði eftirlitseind og mannarættindi, sum heild, verða forankrað í hægri lóg, eitt nú í stýrisskipanarlógini ella í einum *mannarættindaskjali*, har grundleggjandi menniskjarættindi, og fyriskipanir teirra, harundir eftirlitseindin, verða staðfest. Um rættindi verða staðfest í hægri lóg, tryggjar hetta í størri mun

[18] Sama kelda sum í fótnotu 5. Síða 5.
[19] Sama kelda sum í fótnotu 2. Stykki 76.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

stabilitet, virðing, lívsgóðsku og trivnað hjá rættindahavarum, serliga tí at tað í størri mun krevur semjusøkjan at bæði stovna og broyta hægri lóg.

Brekumboðið í altjóða samstarvi

14. Løgtingslógaruppskotið inniheldur ikki nøktandi ásetingar, ið tryggja eftirlitseindini nøktandi grundarlag at luttaka í altjóða samstarvi. Hetta er í stríð við grein 3, stykki e, í París-meginreglunum,[20] sum greiða frá, at eftirlitseindin eigur at hava møguleika at samstarva við ST og viðkomandi stovnar hjá ST, økisstovnar og aðrar grein 33 eftirlitseindir í øðrum londum.

15. ST viðmerkti í 2014 frágreiðingina frá Danmark um mannarættindastøðuna á brekøkinum í Føroyum,[21] at mælt varð til at fremja altjóða brekrættindasáttmálan í føroyskari lóggávu, og at neyðugar eftirkanningar vera gjørdar, soleiðis at tað ber til at tryggja at føroysk lóggáva er í samljóð við hægri lógir sum eitt nú heimastýrislóg, grundlóg og altjóða lóggávu.

16. Í hesum høpi, og við støði í ískoytissáttmálanum til brekrættindasáttmálan, hava einstaklingar rætt at kæra til altjóða brekrættindanevndina hjá ST, um allir kærumøguleikar í nærumhvørvinum eru royndir. Orsaka av, at tað er Danmark, sum vegna Føroyar, formliga hevur limaskapin í brekrættindasáttmálanum, er neyðugt at kanna nærri, um kærumál til altjóða brekrættindanevndina krevja eina ávísa fyriskipan millum Føroyar og Danmark. Ein slík fyriskipan eigur at vera fingin í lag, sum skjótast, og hareftir eiga viðkomandi áhugafeløg og einstaklingar at fáa kunning og vegleiðing. Um hendan fyriskipan manglar, eigur hetta á ongan hátt at ávirka føroyingar, ið bera brek, ið antin hava ella ætla sær at kæra til altjóða brekrættindanevndina. Víst verður til grein 3, stykki 2, í løgtingslógaruppskotinum.

17. Tað hevur eins stóran týdning at tryggja, at Brekumboðið fær fullgóðan og tilskilaðan rætt at luttaka í altjóða samstarvi, eitt nú í ST høpi. Um føroyska brekumboðið ikki verður javnsett við líknandi umboð úr øðrum londum, er vandi fyri at rættindi í Føroyum verða verri stillað, um samanborið verður við onnur lond. Hesi viðurskifti eiga at verða staðfest í løgtingslógaruppskotinum ella mugu tey tryggjast á annan hátt.

[20] Sama kelda sum í fótnotu 5.
[21] Committee on the Rights of Persons with Disabilities Twelfth session 15 September–3 October 2014. Consideration of reports submitted by States parties under article 35 of the Convention. List of issues in relation to the initial report of Denmark. CRPD/C/DNK/Q/1/Add.1. Stykki 37-40.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Fígging

18. Til tess at áhugafeløg hjá fólki, ið bera brek, skulu kunna luttaka í samstarvi við myndugleikar ella í hoyringum, er neyðugt at feløgini hava nóg nógva fíggjarliga orku. Nærum øll limafeløgini hjá MEGD verða rikin av sjálvbodnum, og til tíðir er tað trupult hjá limum í feløgunum at luttaka, millum annað tí tey hava arbeiði ella orsaka av sínum breki ella varandi sjúku. Tey feløgini, sum fáa játtan á fíggjarlógini, tykjast ofta at vera meira virkin og tískil betri umboðað í mun til teirra viðurskifti. Tó kann hetta verða skiftandi, eitt nú um játtanirnar á fíggjarlógini eru merktar til ávísar uppgávur.

19. Sambært løgtingslógaruppskotinum skulu áleið kr. 1,33-1,53 mió. krónur setast av til lønir og nevndarsamsýningar. Harumframt skulu kr. 250.000 setast av til fyrsta árið, at menna heimasíðu, karmar o.l.
MEGD metir, at hendan upphædd er ov lítil, og at ein meira hóskandi árlig játtan hevði ligið um 2,3 mió. krónur, umframt í minsta lagi kr. 400.000 til fyrsta árið at menna fullgóða atkomu.

Brekumboðið og tilbúgving

20. MEGD mælir til, at Brekumboðið fær ein virknan leiklut, tá kreppur raka. Hetta kann bæði vera í sambandi við náttúruskaptar kreppur, náttúruvanlukkur ella eina samanseting av báðum. Brekumboðið eigur at samstarva við restina av tilbúgvingi í Føroyum, og harav áhaldandi tryggja at fólk, ið bera brek, ikki eru fyri mismuni í krepputíð.
Víst verður til stóru granskingarverkætlanina, ResPoNCE,[22] ið gav greiðar ábendingar um, at fólk, ið bera brek, vóru munandi verri stillað og vóru fyri grovum mismuni, tá koronasmittan gjørdi um seg. ResPoNCE verkætlanin kom millum annað til niðurstøðuna, at lond eiga at læra av koronafarsóttini, og harav menna betri tilbúgvingarlóggávu.
Eisini hevur ST millum annað gjørt tilmæli um, hvussu lond eiga at læra av koronafarsóttini, og hvussu fyriskipanir til fólk, ið bera brek, eiga at vera bygdar á sterkari hátt, enn áðrenn farsóttina,[23] og tilmæli um hvussu lond áhaldandi eiga at virka fyri at basa stovnsgerð (*institutionalisering*) undir kreppum.[24] Stovnsgerð, ið kann vera sera skaðiligt fyri fleiri limir í limafeløgunum hjá MEGD, tykist at vera beinleiðis tengd at stórrakstri. Við størri trýsti á vælferðarsamfelagið, eitt nú orsaka av starvsfólkatroti,

[22] www.responce.ie
[23] Support systems to ensure community inclusion of persons with disabilities, including as a means of building forward better after the coronavirus disease (COVID-19) pandemic. Report of the Office of the United Nations High Commissioner for Human Rights.
[24] Guidelines on deinstitutionalization, including in emergencies (2022) CRPD/C/5

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

veðurlagsbroytingum, inflatión, kríggi o.ø., veksur vandin alsamt fyri stovnsgerð, og at fólk, ið bera brek, vera verri stillað.

Skrivstovufelagsskapur og atkoma

21. Mannarættindaumhvørvið í Føroyum er lutfalsliga lítið, samstundis sum tað í stóran mun byggir á servitan. Eins og við øðrum fakøkjum, er tað av stórum týdningi bæði fyri trivnað og fakliga støðið hjá starvsfólki, at hava møguleika at práta við onnur starvsfólk innan sama fakøkið. Tí vil MEGD mæla til, at Brekumboðið fer at hava skrivstovuhølir í einum felagsskapi við onnur, ið eisini arbeiða við mannarættindum í Føroyum.

22. MEGD vil staðiliga mæla til at tryggja góða atkomu í skrivstovuhølunum hjá Brekumboðnum. Í mun til talgilda atkomu eigur Brekumboðið at fylgja dagførdum standardum fyri talgilt samskifti, heimasíðu o.l., sum kallast Web Content Accessbility Guidelines (WCAG).

23. Stór menning verður áhaldandi gjørd í mun til atkomu, eitt nú talgilda, tøkniliga, vitlíki (*Artificial Intelligence*) og annað. Tað hevði verið ein fyrimunur, um løgtingslógaruppskotið áleggur Brekumboðnum at miðja ímóti at vera ein fyrimynd í mun til atkomu.

Langtíðar ætlanir

24. MEGD mælir til at almennu myndugleikarnir, saman við áhugafeløgum, fara at gera eina langtíðar brekpolitisk virkisætlan, ið hevur til endamáls at seta orð á og skipa, júst hvussu altjóða brekrættindasáttmálin skal fremjast til fulnar í føroyskari lóggávu í komandi árini. Sum heild er umráðandi at hava í huga, at rættindi verða orðað á neyvan og ítøkiligan hátt í lógum, kunngerðum o.l. soleiðis at rættindi í verki kunnu handhevjast, um tað vísur seg at tey eru í vanda fyri at verða skerd. Eisini verður víst á, at stórir partar av brekrættindasáttmálanum enn mangla at vera framdir. Hetta er viðkomandi í mun til øll sløg av rættindum, men serliga í mun til búskaparlig, sosial og mentanarlig rættindi, sum í mongum førum taka fleiri ár at fremja. Dømi um hetta er byggiverkætlanir til fólk, ið bera brek, sambært grein 19 í brekrættindasáttmálanum. Við eini langtíðarætlan hevði tað verið gjørligt at tikið atlit til, júst hvussu eftirlitið skal skipast í samstarvi við viðkomandi áhugafeløg, eitt nú um útskifting er í starvsfólkahópinum ella millum sjálvboðin.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Rættartrygd

25. Um dómstólar ella fyrisitingarligir kærumyndugleikar gera úrskurð ella taka prinsippiellar avgerðir, ið hava týdning fyri fólk, ið bera brek, ella avvarðandi teirra, eigur Brekumboðið at hava eftirlit við, at úrskurðir ella avgerðir verða tiknar til eftirtektar. Brekumboðið eigur at gera neyðug tilmæli til loysnir, eitt nú hvussu lógir ella fyriskipanir kunnu tillagast. Brekumboðið eigur at hava førleikar og orku at vegleiða fólk, ið bera brek, um tey ynskja at leggja sak, kæra e.l..

26. Í hesum høpi vil MEGD gera vart við fylgjandi, tó við tí fyrivarni, at hetta ikki beinleiðis er viðkomandi fyri løgtingslógaruppskotið um Brekumboðið: Framkomin fólkaræðilig lond hava mangan sum mál at skapa skilnað ímillum tey trý vøldini: hitt útinnandi, hitt dømandi og hitt lóggevandi. Tó hava lond ymiskar hættir at tryggja eitt uppbyggjandi samskifti ímillum tey trý vøldini, soleiðis at tað ber til at tryggja góða fyrisiting, semju, rættvísi og fólkaræði. Í hesum høpi er virksemið hjá dómstólunum í øðrum londum mangan ein týðandi partur í at menna viðkomandi løgfrøðiligt orðfeingi og hugtøk, rættindafyriskipanir og mannagongdir, almennan kunnleika og mannarættindamentan. Av ymiskum orsøkum tykist tað sum, at dómstólarnir í Føroyum bara í rættiliga avmarkaðan mun taka lut í at menna ella fremja altjóða mannarættindalóg, millum annað í sambandi við brekrættindi. Yvirskipað sæð metir MEGD, at tað helst hevði betrað um bæði rættarkenslu og rættartrygd hjá fólki, ið bera brek, um dómstólarnir høvdu ein virknari og meira almennan leiklut í at kunna um og handhevja rættindi sambært altjóða brekrættindasáttmálanum.

Vinaliga vegna MEGD,

Bárður Atlason Ísheim, aðalskrivari

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo